# Ársins frímerki 2002




*Lesarar hjá kanadiska frímerkjablaðnum "The Canadion Connection" hava kosið føroysku frímerkini, "Víkingar í Atlantssigling", til ársins frímerki 2002*

**Lesarar hjá Kanadiska frímerkjablaðnun "The Canadian Connection" Hava kosið føroysku frímerkini "Víkinga í Atlants-sigling" til ársins frímerki 2002**

TÍÐINDASKRIV

Síðan 1992 hava lesararnir hjá "The Canadian Connection" hvørt ár valt út eitt útlendskt frímerki, sum hevur nakað við Kanada at gera til ársins frímerki. Hesaferð bleiv tað frímerkini "Víkingar í Atlants-sigling", sum Frímerkjadeildin gav út 11. februar 2002, ið bleiv kosið til ársins frímerki 2002.

Føroysku frímerkini komu við í kappingina, tí tey høvdu tað við Kanada at gera, at tey sýna, hvussu víkingarnir sigldu yvir Atlantshavið til Amerika.


Virkisleiðari

P/F Føroya Fiskavirking søkir eftir virkisleiðara til virkið í Miðvági. Virkisleiðarin hevur ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum í Miðvági. Virkisleiðarin myndar virkið úteftir.

P/F Føroya Fiskavirking Miðvági virkar serliga hýsu og upsa. Um summarið virkar virkið serliga gullaks. Vørurnar, ið virkaðar verða, eru á høgum góðskustigi og fevna um m.a. catering- og retailvørur eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiði á Fiskavirking í Miðvági fer fram sambært innaneftirlitsskipan, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Í 2002 virkaði virkið um 5.400 tons av rávøru.

**Uppgávurnar hjá virkisleiðaranum eru m.a.:**
• Leiða arbeiði á Fiskavirking í Miðvági.
• Gera dag- og vikuroknskapir
• Gera rakstrarætlan
• Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum.
• Samstarv um keyp av rávøru.
• Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarnar.

**Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**
• Viðkomandi útbúgving á hóskandi støði.
• Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski.
• Leiðslueginleikar.
• Góðan málkunnleika.
• Góðan samstarvs- og samskiftiseginleika.

Vit bjóða eitt starv í einum mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Løn eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvi fáast frá Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen á tel. 355555.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Skrivlig umsókn verður at senda í seinasta lagi 2. oktober til:

UNITED SEAFOOD
P/F Føroya Fiskavirking
att : Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen.
Postboks 218
110 Tórshavn

P/F Føroya Fiskavirking
Vestara Bryggja
P.O. Box 218
110 Tórshavn
Tel: 35 55 55
Tel: 35 55 50
www.united.fo

UNITED seafood




Øllum tykkum, ið á ymiskan hátt vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 3. mai 2003 ógloymandi, takka vit hjartaliga.

**Helena og Signar Kallsberg**


Heilsøla við kortum

Innbjóðing
Gávukort
Borðkort
Brúdleypskort
Gull- og silvurbrúdleypskort
Føðingardags- og barnakort
Dóps- og konfirmatiónskort
Jólakort
Skemtikort *nú á føroyskum*
Gávuseðlar til & frá

Vit eru við á vørumessuni á bási 28

EB-Heilsølan
Heinagøta 14 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 315090

Sosialurin 341800




# Langur vegur til parlamentarismu í Føroyum



*– Eg havi verið við til at gera 23 fíggjarlógir. Eg kenni ongantíð til, at andstøðan nakrantíð hevur verið við í fyrireikingini av einum fíggjarlógaruppskoti, áðrenn tað verður framlagt, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður*

**Løgmaður roknar við, at tað tekur nøkur ár enn, kanska eitt ella tvey valskeið, áðrenn parlamentarisman í víðari merking kemur at virka í Føroyum**

FÍGGJARLÓG
*Jan Müller*

Seinastu tíðina hava tað verið hvassar atfinningar frá andstøðuni móti samgonguni fyri ikki at taka andstøðuna við í fíggjarlógarviðgerðina. Vit hava spurt Anfinn Kallsberg, løgmann, um hann hevur gjørt nokk fyri at fáa andstøðuna við í viðgerðina av eini fíggjarlóg?

- Man ger kanska ongantíð nokk. Eg havi verið við til at gera 23 fíggjarlógir. Eg kenni ongantíð til, at andstøðan nakrantíð hevur verið við í fyrireikingini av einum fíggjarlógaruppskoti, áðrenn tað verður framlagt. Men eg havi verið við í viðgerð í fíggjarnevnd og tinginum um at royna at fáa breiðar semjur. Tað eigur man at gera. Tað er í veruleikanum landsstýrið, sum fyrireikar eitt uppskot. At vit hava eitt meirilutalandsstýri er kanska medvirkandi til, at man kanska ikki verður tvingaður til at gera tær breiðu semjurnar, sum man sær í øðrum londum.

Løgmaður ivast ikki í, at tann prosessin kemur eisini til Føroya. Hon átti kanska at verið komin longu, tí veruleikin er tann, at tá tú hevur eina 17 manna samgongu og tú ger eitt kompromis, so er tað eisini millum flokkar, har tú gevur og tekur. Tað kann í nógvum førum verða ein skeiv javnvág í slíkum avgerðum. Um tú hinvegin hevði eina minnilutastjórn, so hevði tú verið noyddur at fara út og finna ein meiriluta og tað til fleiri síður.

- Tann møguleikan hevur tú ikki við eini meirilutastjórn. Men tað er nakað, sum tað politiska landsskapið í Føroyum sum frálíður skal búnast til. Tað var jú ikki møguligt at hava eina minnilutastjórn í tí gomlu skipanini sum so, tá skuldi tú hava konsensus um alt.

Løgmaður roknar við, at tað tekur nøkur ár enn, kanska eitt ella tvey valskeið, áðrenn parlamentarisman í víðari merking kemur at virka í Føroyum.

Hann heldur eisini, at høvdu vit havt eina minnilujtastjórn sum í Danmark og Noregi, sum var noydd til at skapa sær meiriluta við at samráða seg til meiriluta í løgtinginum, so hevði alt verið øðrvísi, men hartil er man ikki komin enn.

# Bátafelagið á Bakka á Glyvrum skipar fyri fiskikapping

FISKIKAPPING
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár skipar Bátafelagið á Bakka fyri fiskikapping. Kappingin verður komandi leygardag 20. september.

Tey, ið hava hug at luttaka verða biðin um at møta kl. 06.45 at melda til.

Lagt verður frá landi kl. 07.00. Bátarnir skulu verða aftur í seinasta kl. 15.00.

Báturin við størst veiðu pr. mann er vinnari og nr. 1, 2 og 3 fáa allir steyp til ognar.

Harumframt fær tann, ið fangar størsta fiskin eisini steyp.

Fiskurin verður seldur á uppisølu við felagshúsið niðri á Bakka kl. 16.00. Høvi verður at keypa sær heita suppu, kaffi og køkur.


NÝTT

Netbóking

Nú kanst tú keypa tína ferð á atlantic.fo

Nú er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways. Vit hava nevniliga fingið netbóking á heimasíðuni. Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil. Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.

SANSIR 355 355

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Gjaldkort, sum kunnu nýtast:
Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club

www.atlantic.fo